*Av tí at Malta er vorðið ov lítið, hevur samkoman søkt um, og fingið loyvi til at byggja afturat. Her verður bygt móti grannamarki – ein rúmligur salur.*





*Levi í "bestikkrúminum" har hann samskiftir við umheimin. Levi hevur tvær teldur, teldutøkt myndatól og ætlar at gera heimasíðu.*




*Hvørt hóskvøld í summarhálvuni røðar Levi í matarstovuni á Cosmos Trawl.*

**FAKTA**

**Møtir á Malta:**
Mikukvøld kl 20.00
Sunnumorgun kl 11.00
Sunnudagsskúli kl 13.00
Evangelisk møtir kl 18.00 sunnukvøld.
Fyrsta sunnudag í hvørjum mánaði á donskum

**Møtir aðrastaðni**
Ålborg kl 19.00 - 1. leygarkvøld í mánaðinum
Esbjerg kl 19.30 - 2. fríggjakvøld í mánaðinum
Vejle kl 17.00 - 2. sunnukvøld í mánaðinum
Sønderborg kl 19.00 2. sunnukvøld í mánaðinum
Hóskvøld á Cosmos Trawl í summarmánaðunum

## Bestikkrúmið hjá Levi

Levi, sum er kendur fyri ikki at ræðast nakað, fírir heldur ikki fyri teldunum. Hann hevur ikki minni enn tvær og eitt teldutøkt myndtól í bestikkrúminum. Har eru prentari og telefax. Hann samskiftir á internetinum og so er hann serliga kønur í at hyggja á tey ymsu veðurkortini á telduni, fyri at vita hvussu bátarnir hava tað, og nær teir møguliga koma inn. Levi ætlar at fáa sær heimasíða, har hann kann greiða frá virkseminum hjá Malta og annars sýna fram myndir frá møtum og vitjanum kring Jútland

## Eingin Levi uttan Gretu

Tú hevur ikki tosað leingi við Levi, uttan hann hevur nevnt Gretu nakrar ferðir. Greta er í øðrum hvørjum settningi. "Greta segði, Greta gjørdi".. Greta er blóman í lívinum hjá Levi, sum hann hevur størstu virðing fyri og ikki kann vera fyriuttan. Tey komu at kennast rættiliga ung og giftust bert 21 og 22 ára gomul. Hennara stilla og sáttliga lyndi er hegnisliga skipanin í tí stóru fólkamongd, tey umgangast. Hon fer hóvliga um tá ið hon ger mangan drekkamunnin og mangan góðan bita í tí stilla, meðan Levi við gangi og skemti og tí serliga kæti, hann er kendur fyri, undirheldur gestunum.

Tó, so skemtiligur, sum Levi er, eins álvarsamur, tá ið skriftin verður havd á munni – og Greta situr undir.

Jú, tað kann av sonnum sigast, at Malta er ein óskrivað sendistova ella umboðsstova, sosialkontór, hugnastøva, kaffistova, møtihús og sunnudagsskúli, so krevur tað sín mann. Men eingin maður kann gera slíkan setning, uttan eina raska konu – og tað hevur Levi sanniliga í Gertu!

Hóast skemt, kæti og kaffi, so verður gleðiboðskapurin altíð boðaður við eitthvørt høvið. Levi er ótroyttiligur, ágrýtin og brennandi. Øll fáa somu viðferð: Løgmaður, tú og brotsmaðurin.

Tí hevur Malta við Levi og Gretu á odda vunnið sær stóra virðing gjøgnum árini. Øll vilja vitja Malta, bæði høg og lá – At fáa sær ein drekkamunn, eitt prát, eina hugnaløtu, onkran at tosa við um álvarsmál, onkran at vera saman við, tá ið hart leikar á; tey, ið kenna boðskapin og tey, ið vilja hoyra um boðskapin – og øll fara ríkari avstaðaftur frá Malta, Levi og Gertu.

Tá ið eg undrist á hansara arbeiðsemi, svarar Levi mær.

– Vit eru glað fyri, at okkum unntust so móng góð ár her í Hirtshals – meir enn 25. Men hetta er alt Harrans verk – vit hava bert Honum at takka fyri!

Hygg at sámli 36, vers 6: HARRI, náði Tín røkkur til himmals, trúfesti Tín til skýggini; sigur Levi at enda.

**FAKTA**

**Møtivirksemið hjá hjúnunum Levi og Gretu**

**1978** Levi byrjar at sjómenn við havnina í Hirtshals, fyrstu tíðina vóru fundir umborð á skipum, ið lógu inni.
**1982** fyrsti fundur er á Cosmos Trawl 18. juni
**1983** byrjaðu regluligir fundir í Esbjerg
**1984** Fyrsti fundur er á Malta 1. juli 1984 har 5 fólk vóru til staðar
**1986** Bergur Jacobsen heitir á Malta um at hava møtir á Genner, seinni í Hygum. Hetta helt í 13 ár til skúlin varð niðurlagdur
**1985 – 89** Fundir á Bornholm tá upp í 18 smáir trolarar siglu har
Rønne, Nexø Gudhjem, Taine
**Miðskeiðis í 1990'unum** møtir á Svendborg søfartskole – á Overgade 6
**Miðskeiðis í 1980'unum** møtir á handilsskúla í Varde nógvir føroyskir næmingar gingu har. Hetta var áðrenn handilsskúlin á Kambsdali byrjaði
**1995** møtir í Sønderborg og eru har enn
**1995** møtir í Frederikshavn og heldur á nøkur ár enn
**1997** byrjaði at halda møtir 11. mai har vóru 46 fólk við til henda fundin

Keldur:
Levi og Greta
Jens Arni Kjærbæk
Leirkerið 2006; 1-2
Útisetabókin 2006